LM-103/2020

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 7

Innanhýsis
Tórshavn, tann 18. februar 2021
J.Nr.: 21/00257
(at tilskila í svari)

Viðgjørt:

Hoyringarnotat um

- **Uppskot til løgtingslóg um økisnøvn á internetinum**

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendi tann 12. januar 2021 uppskotið til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum og feløgum. Hoyringarfreist var tann 26. januar 2021.

Uppskotið varð sent til hoyringar hjá hesum pørtum:
Dátueftirlitinum, Elektron, Fíggjarmálaráðnum, FO-ráðnum, Føroya Tele, Gjaldstovuni, Vinnustovninum (Fjarskiftiseftirlitinum) og Vinnuhúsinum (KT-felagnum og Felagnum Samskifti).

Hoyringarsvar komu frá:
- Dátueftirlitinum, fylgiskjal 1
- Fíggjarmálaráðnum, fylgiskjal 2
- FO-ráðnum, fylgiskjal 3
- Føroya Tele, fylgiskjal 4
- KT-felagnum, fylgiskjal 5
- Felagnum Samskifti, fylgiskjal 6

Fíggjarmálaráðið boðaði frá, at ráðið ongar viðmerkingar hevur.

Føroya Tele boðaði frá, at felagið fegnast um uppskotið og tekur fult undir við tí, sum tað er.

Viðmerkingar frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til hoyringarsvarini:

Dátueftirlitið
Til § 10, stk. 4 í uppskotinum
Í sambandi við, at tað í § 10, stk. 4 í lógaruppskotinum er heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um innihaldið í trygdarpolitikkinum, ger Dátueftirlitið vart við:
"..at tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar í kt-skipanunum, eru krøv í dátuverndarlógini til, at dátuábyrgdarin skal seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Sambært lógaruppskotinum hevur Fjarskiftiseftirlitið eftirlit við lógini og ansar m.a. eftir, at trygdarpolitikkur umsitarans lýkur ásettu krøvini í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum.

Viðmerkjast skal, at umsitari og dátuábyrgdari (FO-ráðið) í virksemi sínum og handfaringini av persónsupplýsingum hevur skipaðar karmar og trygdarstøði, ið longu lýkur ásettu krøvini í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum.

FO-ráðið

Til § 9, stk. 2

Í viðmerkingum FO-ráðsins verður víst á, at:

"*Viðmerkingarnar til grein 9, stk. 2, skjóta upp, at tað er umsitarin, sum skal tryggja, at upplýsingar um skrásetara eru rættar alt skrásetingartíðarskeiðið. Hetta er ein avbjóðing, tí kannað verður í dag ikki leypandi hvør er skrásetari ella um skrásetingar eru leypandi rættar og dagførdar. Í dag er kravið sambært viðskiftatreytunum, at tað til einhvørja tíð er skrásetari, sum hevur skyldu at hava egnar upplýsingar dagførdar, serliga um skrásetari ynskir at vera sjónlig (Whois). Um tað skal vera umsitari, sum skal halda eygað við skrásetingum alt skrásetingartíðarskeiðið, vil hetta hava við sær munandi meirarbeiði hjá umsitingini, sum harvið eisini óivað hevur eyka kostnað við sær. FO-ráðið mælir til, at varðveita verandi skipan, sum er, at tað er skrásetari sum til einhvørja tíð hevur skyldu at hava egnar upplýsingar rættar og dagførdar, meðan umsitari (FO-ráðið) tekur sær av dátagrunninum. Allar ásetingar um krøv til mannagongdir, trygd og avtalur eru viðurskiftir, sum FO-ráðið longu arbeiðir við.*"

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur viðgjørt viðmerkingar FO-ráðsins og tikið avgerð um ikki at broyta ásetingina í uppskotinum viðvíkjandi § 9, stk. 2. Hetta tí at ásetingin tryggjar, at umrøddu upplýsingar í mest møguligan mun eru rættar í øllum skrásetingartíðarskeiðinum,

Sambært viðmerkingunum til § 9, stk. 2 í lógaruppskotinum skulu upplýsingarnar hjá skrásetara sambært stk. 2 vera rættar í øllum skrásetingartíðarskeiðinum. Skotið verður upp, at umsitari skal tryggja, at upplýsingarnar viðvíkjandi navni, telduposti og telefonnummari hjá skrásetara, sbr. stk. 1, eru rættar, dagførdar og atkomuligar í tann mun, tað er tøkniliga gjørligt og rímiligt, m.a. sambært altjóða *best practice* á økinum.

KT-felagið

Felagið tekur sum útgangsstøði undir við uppskotinum og vísir á, at:

"*KT-felagið fegnast um, at navnaøkið nú verður lagt í fasta legu og verður lagt undir eitt eftirlit, sum kann fylgja upp uppá eitt hvørt. KT-felagið undraðist tó á, at frágreiðingin til lógaruppskotið viðgerð umsitingina av FO-ráðnum, sum um at vinnan tekur sær av økinum. Tað er ikki rætt. KT-felagið tilmælir nevndarlimir, sum Landsstýrismaðurin setir. Vinnumálaráðið eigur ábyrgdina av økinum. Tað er tí eitt framstig fyri trygdina á økinum, at FO-ráðið nú fær eitt eftirlit at vísa til*".

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Økisnavnið .fo er ogn hjá landinum, og krevst tað longu í dag, at landsstýrið luttekur í skipanini av umsitingini av økinum. Hinvegin hevur tað síðani 2001, tá FO-ráðið varð skipað, verið eitt

ynski frá øllum pørtum at hava somu skipan á økinum, sum galdandi er í grannalondum okkara (t.e. ein sjálvreguleringsskipan, har vinnan umsitur økið). Partarnir (t.e. Vinnumálaráðið, umboð fyri Fróðskaparsetrið og kt-vinnuna) tóku tí í felag stig til at skipa FO-ráðið, sum skuldi loysa uppgávuna viðvíkjandi økisnavninum .fo.

FO-ráðið er skipað sum sjálvsognarstovnur og er ikki partur av almennu umsitingini. Talan er um stovn, sum er skipaður á eginrættarligum grundarlagi. FO-ráðið og umsitingin av økisnavn.fo eru ikki skipað í ella sambært lóg, men sambært viðtøkum, sum ráðið sjálvt hevur gjørt.

Internetsamfelagið í Føroyum er umboðað í FO-ráðnum, og tekur sær harvið í dag av umsitingini av økisnavninum. Við hesum lógaruppskotinum verður lagt upp til, at hetta skal halda fram.

Tað verður framvegis landsstýrið, sum hevur ræðið á økisnavninum .fo, og sum veitir umsitara eitt loyvi til at umsita økisnavnið. Stovnur undir landsstýrismanninum fer at hava eftirlit við, at umsitari yvirheldur sínar skyldur sambært lóggávuni og loyvistreytunum. Loyvið hjá umsitara kann verða tikið aftur og verða latið einum øðrum umsitara.

Viðmerkingarnar frá KT-felagnum hava ikki ført til, at broytingar eru gjørdar í uppskotinum.

Felagið Samskifti

Felagið Samskifti vísir í viðmerkingum sínum á, at felagið:
"*..skilur ikki heilt hvat endamálið við lóggávuni er. Í dag hava vit FO-ráðið, sum tekur sær av umsitingini. Lógin leggur upp til, at økið skal kunna bjóðast út, men ikki við vinningi fyri eyga. Tað tykist heilt óneyðugt at bjóða økið út. Eisini leggur lógin upp til, at mann hevur eftirlit við umsitaranum. Tað átti at verið nóg mikið við eftirlitinum. Tá stendur FO-ráðið til svars fyri økinum og má tryggja tryggan og sunnan rakstur.*

Tað tykist sum, at lóggávan leggur upp til, at økið skal privatiserast, men samstundis verður í lógini ásett at umsitingin av økisnøvnum á internetinum ikki má fara fram við vinningi fyri eyga. Hvussu skal mann gera íløgur í eitt nú trygd, um mann ikki skal tjena pening? Umsitingin má hava umstøður at gera alneyðugar íløgur, serliga í trygd. Men tað, sum er avgerandi er, at prísurin fyri veitingar er støðugur, heldur enn at umsitingin má seta prísin upp, hvørja ferð ein íløga skal gerast.

Viðvíkjandi møguligum útboðið av umsitingini av navnaøkið metir Samskifti, at tað er betur at hava FO-ráðið, at umsita økið, heldur enn at fólk í vinnugreinini møguliga skulu sita og umsita onnur í vinnuni.

Av serstøkum viðmerkingum heldur Samskifti:

Viðvíkjandi ***kapitli 4***
Samskifti metir, at tað átti at verið munandi betur allýst, hvat góður økisnavnasiður er. Hetta lógarøkið er vælkent í grannalondunum og tí átti tað at borið til at funnið íblástur til allýsingar. Felagið heldur ikki, at tað er rætt at bíða eftir, at rættarskipanin skapar siðvenju á økinum.

Viðvíkjandi ***kapitli 3, stk. 6***
Tað átti at verið nærri greina, hvør situr sum umsitari. Eitt nú hevur felagið Samskiftið eftirlýst høvi at innstilla ein nevndarlim í FO-ráðið við tí servitan innan økisnøvn á internetinum, sum er hjá limafyritøkum."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Viðvíkjandi endamálinum við uppskotinum

Sum umrøtt í almennu viðmerkingunum í kapitli 1 í lógaruppskotinum eru internetøkisnøvn at meta sum eitt tilfeingi, ið hevur avgerandi týdning fyri kritiska undirstøðukervið (infrastrukturin) í Føroyum. Seinastu árini hevur tøkniliga menningin á økinum tikið dik á seg og onnur lond, sum t.d. Danmark, Norra og Ísland, hava í hesum sambandi skipað internetøkisnøvn við lóg.

Skipanin við internetøkisnøvnum, sum hevur verið galdandi í Føroyum síðani 2001, er ikki skipað við lóggávu. Internetøkisnøvnini hava verið umsitin eftir privatrættarligum treytum í einari sokallaðari sjálvreguleringsskipan, sum umboð fyri føroyska internetsamfelagið eftir avtalu við avvarðandi landsstýrismann hava tikið sær av. Av tí, at tøkniliga menningin á økinum, internetið og nýtslan av økisnøvnum hava verið støðugt vaksandi og hava alsamt øktan týdning fyri einstaklingin, vinnuna, almennar myndugleikar og samfelagsbúskapin í síni heild, er neyðugt at ganga somu leið sum okkara grannalond og skipa økið við lóg.

Í galdandi skipan er m.a. ógreitt, hvør hevur evstu ábyrgd av økinum og formliga heimild at leggja uppí, um umsitingin av økisnavninum .fo ikki virkar til lítar. Herumframt er leiklutabýtið millum myndugleika og umsitara av økisnøvnum á internetinum eftir galdandi skipan ógreitt, og tørvur er á at áseta yvirskipaðar reglur og treytir fyri umsitingina av økisnavninum .fo og møguligum øðrum økisnøvnum, ið verða tillutað Føroyum. Harumframt er tørvur á at fáa greiðar karmar og reglur fyri umsitingina av økisnøvnum, ið tryggja atkomu, gjøgnumskygni og gagnnýtslu av tilfeinginum, undir hesum ásetingar um kt-trygd og eftirlit við umsitingini.

Viðvíkjandi non-profit
Viðvíkjandi meginregluni um *non-profit* er endamálið við ásetingini í § 6, stk. 2 at tryggja, at umsitingin av økisnøvnum á internetinum, ikki fer fram við vinningi fyri eyga. Skotið verður upp at halda fram við meginregluni um, at umsitingin skal útinnast á einum kostnaðargrundaðum og ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit). Samstundis verður krav sett um effektivitet og gjøgnumskygni í fíggjarviðurskiftum umsitarans.

Við at varðveita verandi meginreglu um ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit), fer kostnaðurin hjá skrásetarunum at svara til tað, sum tað væntandi hevði kostað, um uppgávan varð útint í almennum høpi og fíggjað við gjøldum.

Raksturin og útboð av tænastum skulu vera grundað á samlaða kostnaðin av útreiðslunum og dentur leggjast á rímiligan prís. Gjøld skulu endurspegla veruligu útreiðslurnar og vera grundað á eitt objektivt, gjøgnumskygt og ikki-diskriminerandi grundarlag. Hetta merkir, at gjøld fyri umsiting einans kunnu byggja á samlaðu útreiðslurnar í eitt longri tíðarskeið. Langtíðar fíggjarviðurskiftini skulu vera rímilig, eins og kapitalur má vera til at tryggja framtíðar raksturin, soleiðis at tað er rúm fyri menning.

Viðvíkjandi møguligum útboði av umsitingini

Sambært § 3 í uppskotinum kann landsstýrismaðurin taka avgerð um, at rættindini til at umsita eitt ella fleiri økisnøvn, sum eru tillutað Føroyum, verða boðin út, ella at eitt verandi loyvi til at umsita eitt ella fleiri økisnøvn verður longt.

Av viðmerkingunum til § 3 sæst m.a., at í sambandi við eina møguliga støðutakan til, um eitt útboð skal fara fram ella eitt loyvi skal leingjast, er tað viðkomandi, at landsstýrismaðurin hoyrir vinnuna fyri á tann hátt at fáa innlit í, hvat internetsamfelagið heldur um spurningin.

Sjónarmiðini hjá internetsamfelagnum eru týðandi partur í avgerðargrundarlagnum hjá landsstýrismanninum.

Tað er vanlig praksis, tá ið landið veitir loyvi til privat at umsita eina uppgávu, at hetta verður bjóðað út. Tá lóggáva verður skipað á einum øki sum hesum, er tað natúrligt at reglur verða ásettar um útboð. Í hesum uppskotinum er eisini ásett ein heimild til, at landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at verandi loyvi verður longt. Sum er, er ætlanin at leingja verandi loyvi, men skuldi tað av einari ella aðrari orsøk seinni verið neyðugt at finna ein annan umsitara, tá verður hetta eftir reglunum um útboð.

Viðvíkjandi kapitli 3
Sambært § 6. (Kapittul 3) skal umsitari hava breiða umboðan av luttakarum úr føroyska internet samfelagnum, heruppií umboð fyri privatar brúkarar, professionellar brúkarar og veitarar. Samanumtikið skal umsitari hava hóskandi førleikar til at umsita økisnavnið sambært hesi lóg.

Av viðmerkingunum til § 6, stk. 1 sæst, at skotið verður upp, at umsitari skal hava hóskandi fakligar førleikar, undir hesum breiða umboðan úr og vera grundfestur í føroyska internet samfelagnum, heruppií skulu vera umboð fyri privatar brúkarar, professionellar brúkarar og veitarar.

Hugtakið "internet-samfelag" fevnir sum útgangsstøði um øll tey, ið hava áhuga fyri menningini av internetinum. Í roynd og veru fevnir hugtakið um ein og hvønn, ið hevur áhuga fyri økinum. Hugtakið internet-samfelag hevur soleiðis ikki eina avmarkaða støddd, men er dynamiskt og kann mennast yvir tíð.

Tá uppskotið fyrstu ferð var til hoyringar hjá viðkomandi pørtum, viðmerktu bæði Samskifti og KT-felagið, at Samskifti eigur at hava ein lim í FO-ráðnum. Harvið tykist semja at vera í vinnuni um málið, men tað er nevndin í FO-ráðnum, ið má taka støðu til spurningin, um talið av limum skal økjast.

Viðvíkjandi kapitli 4
Sambært § 13. (Kapittul 4) mugu skrásetarar ikki skráseta og nýta økisnøvn í stríð við góðan økisnavnasið. Av viðmerkingunum til § 13, stk. 1 sæst, at skotið er upp, at tey, sum skráseta økisnøvn, hava eina vanliga skyldu at vísa sømiligan atburð samsvarandi góðum økisnavnasiði. Ásetingin er at meta sum ein aðaltreyt.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur nágreinað í viðmerkingini til § 13, hvat dentur kann leggjast á í sambandi við metingina, um treytin um góðan økisnavnasið er hildin.

Í tí føri, tað snýr seg um at orða yvirkipaðar leiðreglur fyri góðan økisnavnasið, verður roknað við, at FO-ráðið orðar nærri leiðreglur um góðan økisnavnasið.